Steðgaði við garðin

Tá vegirnir eru hálir, er neyðugt tíðliga á morgni at koyra salt á

Ein bussførari í Havn slapp ótrúliga væl gjáramorgunin.

Hann koyrdi á bussleið 6, og kl. trý korter til átta skuldi hann niðan gjøgnum brekkuna á Heygsvegnum.

Tá hann var komin næstan niðan á høvdina, fór bussurin at spola og slapp ikki longur niðan. Og so á glið oman brekkuna.

Busførarin stýrsi businum, meðan hann gleið, og bussurin steðgaði við garðin omanfyri handilin Hjá Eli. Hevði hesin garður ikki verið, var bussurin endaður inni í handlinum. Bussurin fekk ikki so mikið sum eina skøva.

Bara eitt ferðafólk var í bussinum.


Bussførarin hevði koyrt allan morgunin. Hann var ikki greiður yvir, at brekkan var so hál.

Slíkar dagar gongur væl at koyra teirfyrstu tímarnar, áðrenn nógv ferðsla er. Men tá allir bilarnir koma á vegirnar, byrjar ruðuleikin, tí fleiri vinna ikki fram.

Bussførararnir halda, at tað rætta hevði verið at stroytt salt á vegirnar tíðliga, áðrenn øll skulu til arbeiðis. Nú verður byrjað alt ov seint, hvør so hevur ábyrgdina av tí. Fyri jól var nógv betri, tí tá varð saltað fyrr á morgni á teimum vegum, har bussarnir koyra.

Bussarnir hava píkadekk. Teir fá ikki brúkt ketur.

Píkadekk hjálpa ikki í hálku ein slíkan morgun. Tá er salt á vegirnar einasta loysnina, sigur bussførarin á leið 6 gjáramorgunin.



randi

Hevði garðurin ikki verið, var bussurin endaður inni í handlinum. Bussurin mundi ikki sloppið avstað aftur. Handilsmaðurin kom út at hjálpa við at stroya salt á. Mynd: Kalmar

Kærkomið hjá svongu flakavirkjunum í Føroyum:

Íslendingar landa til uppboðssøluna

Góð útlit eru til, at íslendingar fara at góðkenna Føroyar sum landingar stað. Hetta var eitt av úrslitunum hjá Atla Dam, løgmanni og John Petersen, fiskimálaráðharra á fundi í Svøríki við umboð fyri íslendsku stjórnina.

Atli Dam, løgmaður sigur við Sosialin, at spurningurin um, at íslendsk skip, sum annars leggja leiðina inn á europeiska meginlandið at selja fiskin á uppboðssølu, ístaðin skullu kunnu landa í Føroyum, var frammaliga á fundinum í Stokkhólmi. Hann heldur tað vera góð útlit fyri, at okkurt positivt fer at henda í hesum málinum, soleiðis at okkara flakavirki um ikki so drúgva tíð kunnu keypa fisk frá íslendskum skipum á uppboðssøluni.

Um so verður, so má hetta sigast at verða eitt sera stórt framstig, nú virkini í Føroyum tørva fisk, so tað munar. Men fyritreytin fyri at fáa íslendingar at leggja inn í Føroyum heldur enn at halda leiðina framvið Føroyum til uppboðssølurnar í eitt nú Hull og Grimsby er tann, at prísurin á føroysku uppboðssøluni er so mikið "attraktivur", at skipini samanlagt kunnu fáa meira burtur úr.

Íslendingar hava gjørt nógv burtur úr at selja ísaðan fisk av landinum. Í 1989 fóru umleið 32.000 tons av landinum á henda hátt, men í fjør var talan um 17.000 tons. Løgmaður heldur, at kunnu vit bara fáa ein part av hesum fiskinum, so fer tað at muna hjá virkjunum. Men her verður so talan um 3. landsfisk, so lidnu vørurnar mugu seljast til lond uttanfyri EF, og tað eigur so eisini at bera til heldur løgmaður, sum vónar, at føroyska uppboðssølan veruliga verður før fyri at fáa íslendingar at venda eyguni henda vegin.

jan



áðrenn hálvan februar, soleiðis at skipini tá eisini sleppa fyrr avstað sigur Atli Dam, løgmaður.

jan

Royna at sleppa fyrr til Íslands

Einki endaligt úrslit spurdist burtur úr samráðingunum í Stokkhólm millum føroyskar myndugleikar og íslendskar um føroysku kvotuna í íslendskum sjógvi í ár. Íslendingar ynskja at minka um kvotuna, sum í fjør var uppá 9000 tons. Feløg í Íslandi hava lagt stórt trýst á stjórnina at siga føroyingum, at kvotan verður minkað, nú íslendingar sjálvir hava skert sínar egnu kvotur.

Atli Dam, løgmaður sigur, at kvotan verður helst minkað, men spurningurin er bara hvussu nógv . Hann sigur annars, at føroyingar á fundinum í Svøríki strongdu á íslendingar at fáa skipini fyrr avstað. -Eg vóni, at tað fer at bera til at fáa spurningin um, nær skipini kunnu byrja at veiða, avgreiddan longu

WP er eisini...
Dinitrol
DITEC
CARCLEAN CENTER
RUSTVERJA Í SERFLOKKI, -VIÐ VÁTTAN!
pf. wenzel petersen, tlf. 13873